DAGSINS MEINING

Hagtøl skapa ruðuleika um prís

Eftir øllum døma fer nevndin fyri P.f. Vágatunnilin at lækka kostnaðin at koyra gjøgnum tann fyrsta undirsjóvartunnilin seinri í vikuni. Hetta hendir eftir ramaskríggið, sum var at hoyra úr Malinstindi til Kirkjubøarreyn, tá tann ásetti prísurin varð kunngjørdur í næstsíðstu viku.

Gjøgnum fjølmiðlar løgdu vágafólk óbeinleiðis eitt hart trýst á politikkarar og nevndina fyri Vágatunnilin. Tá annar maðurin í Vágum kanska situr eitt sindur leysur í sessinum, var løgmaður skjótur at viðmerkja, at prísurin at ferðast gjøgnum tunnilin skuldi takast upp politiskt.

Aðrir flokkar hava sjálvandi verið úti við boðskapum um, at kostnaðurin er ov høgur. Sjálvandi, tí tað er jú opportunt, og vágafólk skulu jú helst merkja, at onkur hugsar um tey - kanska meira um onnur, sum skulu sigla við stranfaraskipum.

Men landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur kortini hildið fast um, at grundleggjandi avtalan um, at lánini skuldu fíggjast við brúkaragjaldi, skuldi haldast, og at landskassin ikki skuldi átaka sær ein part av lánsbyrðuni.

Men tað er ikki pilkað við hetta prinsippið. Afturímóti er komið fram, at tølini um, hvussu nógvir bilar verða fluttir um sundið í dag fyri at rokna út og meta, hvussu stór ferðslan verður í undirsjóvartunnlinum, hava ikki verið nóg eftirfarandi.

Sambært tí, sum er komið fram høvdu Strandfaraskip Landsins ikki neyv tøl. Tvørturímóti vístu tøl hjá tí eina skiparanum, sum varð við í útvarpssending herfyri, at talið av bilum er nógv hægri enn tað, sum nevndin í Vágatunnlinum hevur fingið. Um hetta er so, er hetta aftur eitt dømi um, at vit eru eftirbátar, tá tað snýr seg um hagtøl.

Eftir øllum at døma skal prinsippið um brúkaragjald haldast. Hinvegin er rætt at umrøða spurningin, um tað ikki er rætt, at Landsverkfroðingurin tekur sær av viðlíkahaldi o.ø., sum hann ger við almenna vegakervið annars, hóast Vágatunnilin er ogn hjá almennum partafelag.

Somuleiðis er rætt at endurskoða grundarlagið fyri, hvussu stór ferðslan er, og hvussu stór hon fer at verða. Men seinasta avdúkingin um vantandi neyv hagtøl, styrkir ikki um álitið á almenna hagtalsgrundarlagið í Føroyum. So vónandi kann hetta dømið við manglandi hagtølum fáa okkara politikarar at gera nakað við málið um hagtøl og at taka til eftirtektar tað sum stjórin í Búskaparáðnum so væl vísti á herfyri.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

15 ár og ein undirsjóartunnil

Hóast nógv ár eru liðin síðani hetta arbeiði sá dagsins ljós, og nógvar forðingar hava verði á vegnum, so kunnu vit kortini fegnast um at undirsjóartunnlin gjørdis verunleiki, skrivar Lasse Klein, fyrr. landsstýrismaður í samferðslumálum.

Lasse Klein
fyrrv. landsstýrismaður í samferðslumálum

Í november 1985 verður stóra tunnilsætlanin almannakunnug: Kunoyartunnilin, Sev-tunnlarnir á Eiði, Sumbiartunnilin, Signabø-Kalbakstunnilin og Gásadalstunnilin. Aðrenn hetta var Leirvíkstunnlin tikin í nýtslu, og seinasta skotið latið av í Kallsoyartunnulunum.

Stórar verkætlanir

Um sama mundi vóru aðrar stórar verkætlanir í umbúna m.a. vesturi í Vágum, meðan aðrar ikki høvdu sæð dagsins ljós: Atlantic Airways var undir uppsigling, hangarbyggingin í stoypiskoyðini, nýtt strandferðsluskip til Mikinesar, nýggj tyrla o.s.fr. Eisini aðra staðni í landinum vóru rembingar frammi um útbyggingar: Gamlarætt, FM sendistøðin, Skálafjarðarsiglingin, Sandoyarsiglingin, sambandi um Suðuroyarfjørð, Bygdaleiðir, Funningsvegurin, fast samband um Haraldsund o.s.fr.

Kemur gongd á

Spurningurin um fast samband um Vestmannastund var longu tá fleiri ára gamal. Tey flestu minnast til uppskotið hjá Vilhelm Nielsen og Haldur Hansen um heingibrúgt um stundið. Men ikki fyrr enn trupulleikin um verðandi farleið krevur ábøtur: nýtt strandfaraskip ella "okkurt annað" kemur gongd verunliga á málið.

Á teimum skjølum (havi uml. 600 skjøl) sum undirritaði hevur til skjals framgongur, at landsverkfroðingurin hevur gjørt kanningar, og at ávísar jarðfrøðisligar kanningar vóru gjørdar av Jóannes Rasmussen, jarðfrøðingi í 1986, og 2. februar 1987 fara Mikkjal Helmsdal, Henning Jacobsen, Jørn Thomsen og Jóannes Rasmussen til Danmarkar og Norra at tosa við jarðfrøðingar og verkfrøðingar um spurningin, og 6. februar 1987 eri undirritaði við í kanningararbeiðinum í Norra. Afturkomin úr Norra sendi undirritaði eitt tíðindaskriv út um ferðina, og máli fær nógva umrøðu hesar dagar.

Frágreiðingar og fundarvirksemið

Longu tíðiliga í 1986 bóðu Helgi Fossadal og Anfinnur Setberg um fund við landsstýrismannin í samferðslumálum, teir vóru fíggjarligu og tekniski ráðgevarar hjá Felagskommununum í Vágum, og greiddi frá ætlanum. Seinnri komu frágreiðingar um 1) teknisku møguleikar, 2) hvussu arbeiði skuldi fíggjast, 3) hvussu arbeiði skuldi skipast o.s.fr. Seinnri var fundur úti í Tinganesi við felagskommununa um ætlanina. Umframt fjølbroytt fundarvirksemið við landsverkfroðingin, landsstýrið, samgongu, Felagskommununa í Havn og Vágum og einstaklingar.

Tað var þortunum heilt greitt, at skuldi ein so kostnaðarmikil ætlan sum hendan eydnast til fulnar, so var neyðugt við politiskari undirtøku, ikki bara frá landsstýrismanninum, men eisini frá politisku skipanini. Á fyrsta fundinum fingu umboðini fyri felagskommununa nakrar vikur í at kunna sínar flokkar um ætlana, og tá 1987 var byrja at halla, var politiski hugburðurin á øllum økjum positivur.

Felagskommunan

Felagskommunan í Vágum hevði gjørt eitt grundleggjandi gott arbeiði. Formaður fyri Felags-kommununa var Johannus Ellefsen, og saman við honum Martin Nielsen sum umboðaðu Miðvágs Kommunu. Fyri Sørvág: Eyðun Thomassen og Dánjal Tausen. Fyri Sandavág: Jóanis Nielsen og Osmund Joensen. Fyri Bø: Elias Petersen og Gutti Petersen. Fyri Kvívík: Kristian Magnussen og Petur Múller.

Nú tá íð nøvn verða nevnd í hesum sambandi so kann eg heldur ikki lata verða við at nevna frágreiðingina frá ferð í Norra hjá Arnfinnur Setberg og Dánjal Poulsen í juni 1987. Heldur ikki skal leikluturin hjá Karl Jóhan Nielsen, tannlækna á Vatnsoyrum verður gloymdur. Hann var ein góður stuðul.

Politiska viðgerðin

Í september 1987 var heitt á búskapardeildina um at koma við einum notati um sambandið um Vestmannasund, samfelagsbúskaparliga sæð. Hendan frágreiðingin kom á borði 28. oktober 1987, og 16. november 1987, var samlaða ætlanin send landsstýrinum til viðgerðar og støðutakan, og góðar tríggjar mánaðir aftaná ella tann 17. mars 1988 legði landsstýrismaðurin í samferðslumálum tunnil um Vestmannasund til tingsins viðgerð. 5. mai 1987 var lógin endaliga samtykt við 31-0 atkvøðum, og 9. juni 1988 var lógin lýst at galda.

Tungur burður

At fáa málið um undirsjóvartunnlin um Vestmannasund loyst á hendan hátt var ein tungur burður, og eg vil takka øllum teimum sum á ein fyrimyndarligan hátt vóru uppi í hesum arbeiði. Hóast 15 ár eru liðin síðani hetta arbeiði sá dagsins ljós, og nógvar forðingar hava verði á vegnum, so kunnu vit kortini fegnast um at undirsjóartunnlin gjørdis verunleiki.

Hjartaliga tilukku

Nú havi eg bert viðgjørt ígongdsetana av hesi verkætlan. Men eisini tey sum við tógvi stríð at enda vóru við at bera ætlanina á mál eiga tøkk uppiborna. Ikki minst skiftandi landsstýrir, nevndin fyri undirsjóvartunnlin, tingmenn og seinast, men ikki minst Felagskommunan í Vágum og ikki at gloyma Vága Vinnufelag. Váagafólk – Føroyingar! vit hava orsøkir til at ynskja hvørjum øðrum tilukku við hesi verkætlan. Hjartaliga tillukku!

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Fíggjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Jón Brian Hvidtfeldt
jonbrian@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

Rullandi redaktionin:
tel. 220507

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framihjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfar. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

”Jú, so roynast álitismenn!”

Ein rættleiðing til røðuna, ið Jógvan við Keldu, løgtingsmaður helt á ráðstevnuni um ”Trivnaðar- og heilsumál nú og í framtíðini,” sum varð hildin í norðurlanda-húsinum hósdagin 14. og fríggjadagin 15. november. Røðan varð endurgivin í Norðlýsinum fyri fríggjadagin 22. november

Vilhelm Johannesen

Í røðuni sigur Jógvan við Keldu m.a., at samlaðu útreiðslurnar á fíggjarlógini fyri næsta ár eru 3,2 mia. kr., og at játtanin til almanna- og heilsumál er 1,7 mia.kr. ella 53 prosent av samlaðu útreiðslunum. Men hetta er ikki heilt rætt.

Í mínum eintaki av fíggjarlógaruppskotinum eru samlaðu útreiðslurnar ikki 3,2 mia. kr., men 3 mia. 631 mió. og 207 tús. kr. Játtanin til almannaheilsumál er 1 mia. 727 mió. og 903 tús. kr.

Men tað, sum má falla einum fyri bróstið, eru orðini hjá Jógvan við Keldu, tá hann sigur, at vit hava ráð til tey veiku, men ikki til ov stóra og fløkta umsiting. Aftan á løgtingsvalið 30. apríl 1998, gjørdist Jógvan við Keldu partur av parlamentariska grundarlagnum hjá landsstýrinum og samgonguni, sum sat fram til løgtingsvalið 30. apríl 2002. Í hesum tíðarskeiðnum hækkaðu útreiðslurnar til almennu umsitingina úr 53,8 mió. kr. í 1998 upp í 105,5 mió. kr. í 2002.

Aftan á løgtingsvalið 30. apríl 2002 helt Jógvan við Keldu fram sum partur av parla-mentariska grundarlagnum hjá landsstýrinum og samgonguni. Taka vit so uppskotið til fíggjarlóg fyri 2003, og sammeta hetta við fíggjarlógina fyri ávikavist 1998 og 2002, so síggja vit, at í mun til 1998 er talið av aðalstýrum vaksið við 50 prosentum - úr seks upp í níggju - og uppskotna játtanin til almennu umsitingina í 2003 er 137,9 mió. kr. ella 32,4 mió. kr. hægri enn í 2002 og 84,1 mió. kr. hægri enn í 1998. Eg endurtaki - ein vøkstur í útreiðslunum til almenna umsiting á 84,1 mió. kr. eftir bara fimm árum, og ein vøkstur á 32,4 mió. kr. frá einum ári til annað.

Tá vit so hugsa um røðuna hjá Jógvani við Keldu í norðurlandahúsinum, sum er endurgivin í Norðlýsinum seinasta fríggjadag, so er nakað galið. Veit Jógvan við Keldu veruliga ikki, at í hansara tíð sum samgongumaður á tingi, er talið av aðalstýrum vaksið úr seks upp í níggju og at játtanin til almennu umsitingina í sama tíðarskeiði er hækkað úr 53,8 mió. kr. uppí 137,9 mió. kr.? Ella roynir Jógvan við Keldu við vilja, at billa áhoyrarum og lesarum nakað inn, sum ikki hevur hald í veruleikanum? Jógvan við Keldu eigur eintók av fíggjarlógunum og landskassaroknskapunum fyri hesi árini. Tað er bara at sláa upp, so fær hann prógv fyri at eg havi rætt, tí í nevndu bókum standa hesi tølini við svørtum á hvítum.

Meirjáttanin til almennu umsitingina í 2003, í mun til 2002, á 32,4 mió. kr. minnir ótrúliga nógv um upphæddina, sum landskassin sambært lógini um fíggjarárinum 2003.

Skúlabygging krevur neyva fyrireiking, tí neyðugt er nágreiniliga í sjálvari fyrireikingini av byggingini at áseta samsvarið, ið verða skal millum innihald, endamál, framtíðar avbjóðingarnar í útbúgvingini og sjálva byggingina av skúlanum. Bert soleiðis megna vit at framtíðartryggja menningina av okkara útbúgvingum, og bert soleiðis fáa vit skúlabygningar, ið megna námsfroðiligu avbjóðingarnar í framtíðarskúla okkara.

Peningur er eisini settur av til stovnsetan av skúlatilboði til ung menningartarnað.

Umframt hetta er játtan til stovnsetan av nýggjum megin-, fólka- og skúlabókasøvnum runt landið. Forminnissavnið skal skifta tak, og arbeiðið við at varðveita Kirkjubømúrin fær eisini sín lut í íløgujáttanini. Føroya Náttúrugripasavn fær eisini ein brotpart av íløgujáttanini til flyting og framhaldandi umbygging av gamla bókasavnshúsinum á Debesartrøð og í Kaldbak.

SvF og ÚF hava gjørt heildarætlanir fyri umlegging til digitalu tøknina og fáa ávíkavist 3- og 1 millión kr. á íløguætlanini.

Undirvísingar- og mentanarøkið krevur ílogur

Hetta eru sostatt raðfestu økini á íløguætlanini hjá Mentamálum næsta ár. Størri verkætlanir, ið skulu fremjast yvir nøkur ár, eru samanflættaðar við minni verkætlanum, sum bert hava játtan tað eina árið fyri neyðuni.

Á fundi í Fíggjarmálaráðnum fyrst í september í ár, har allir landsstýrismenn, løgmaður og umboð fyri flokkarnir vóru við, varð eitt uppskot til íløguætlan býtt út, ið greidliga vísti á íløgutørvin á undirvísingar- og mentanarøkinum 2003 - 2013.

So løgmaður kann tann dag í morgin boða til fundar fyri at viðgera framtíðar ílogurnar á undirvísingar- og mentanarøkinum. Hann skal kortini gera sær púra greitt, at júst hetta økið hevur víkt fyri øðrum stórum ílognum farnu árini, og at tíðin tí er komin til at undirvísingar-og mentanarøkið fær sín bróðurpart av ílogujáttanini komandi árini.

Rættleiðing til løgmann

Annlis Bjarkhamar
Landsstýrismaður í mentamálum

Tað fyrikemur mær at verða óhugsandi, at løgmaður ikki hevur betur innlit í okkara íløguætlanir, enn tað hann borðreiðir við í Dimmalætting, fríggjadagin 22. november.

Tað eigur ikki at bera til, at landsstýrismenn og umboð fyri samgonguflokkarnir saman við **løgmanni** í tímar, dagar og vikur hava viðgjørt bæði fíggjarlógina og íløguætlanir, at løgmaður nú í tólvta tíma kemur sum ketta upp úr høvdatrogi og kunnger fyri Føroya fólki, at í mentamálum er lítið skil í íløguætlanunum, og at har kunnu vit ikki vænta okkum, at stórvegis fer at koma burturúr.

Hví løgmaður ger hetta, er mær ein gáta. Men tað sum verri er, er at hann varpar skeivleikar út til Føroya fólk, sum beinleiðis eru við til at skaða trúvirðið hjá samgonguni og hjá mær sum nýggjum landsstýrismanni.

Tað tykist mær ógvuliga løgið, at løgmaður gjøgnum Dimmalætting ger sína stoðu galdandi. Hann hevur havt allar møguleikar at ávirka fíggjarlógararbeiði og tær raðfestingar, sum har eru gjørdar. At hann ikki hevur gjørt tað, kann hann bara lasta sær sjálvum fyri.

Eg kann til eina og hvørja tíð verja tær raðfestingar, eg havi gjørt á íløguøkinum, og ætli mær eisini komandi árini at stríðast fyri, at júst hetta økið fær tær neyðugu játtanirnar til ílogur.

Skeivir upplýsingar

Hvønn týdning løgmaður leggur í tað at samstarva, veit eg ikki. Í míni verð merkir samstarv, at vit mugu treyta hvønn annan, at vit tryggjað hvørjum øðrum eina sakliga viðgerð, og at tað sum verður sagt alment, er satt.

Tað átti ikki at verið neyðugt hjá løgmanni at nýtt Dimmalætting sum talurør. Hann kann til eina og hvørja tíð, um tað eru ivamál viðv. mínum málsøki, at spyrja seg fyri hjá mær, og soleiðis fáa ruddað ivamál, væntandi innlit o.a. av vegnum. Men hetta veljir hann ikki at gera og hevur hann tí sum leiðari í samgonguni lagt støðið.

Eg kenni tað sum mína skyldu, bæði fyri mína egnu skuld, fyri skúla- og mentanarøkið og fyri samgongunnar skuld at vísa aftur nøkrum skeivleikum í viðtaluni við løgmanni.

Rætta søgan

Tað eru ikki 11 fyrireikingarverkætlanir innan skúlabygging í gongd í Mentamálaráðnum. Hvar løgmaður og Sonja Jógvansdóttur hava hetta talið frá, skulu gudarnar vita. Tað átti at verið lætt hjá teimum báðum - tíðindakvinnuni og løgmanni - at brúkt nakrar minuttir av samrøðuni at kaga gjøgnum uppskotið til fíggjarlóg fyri 2003, fyri soleiðis at fingið røttu myndina av íløguætlanunum á undirvísingar- og mentanarøkinum. Men tað hava tey bæði eftir øllum at døma ikki givið sær stundir til. At tíðindakvinnan ikki ger tað, og møguliga er eitt sindur óvitandi um júst hetta økið, kann eg fyrigeva. Men at løgmaður ikki ger tað, og er eins óvitandi og tíðindakvinnan, tað undrar meg stórliga.

Lat meg í stuttum greiða frá íløguætlanini fyri 2003 á undirvísingar- og mentanarøkinum, soleiðis at allir skeivleikar verða beindir av vegnum.

Í 2003 er ætlanin at fyrireika 3 verkætlanir í samband við nýbygging av skúlum. Hesar eru Skúladepilin í Marknagili, Listaskúlin á Sandoynni og Fiskivinnuskúlin í Vestmanna.

Ein útbygging av Tekniska skúla í Klaksvík fer eisini at verða fyrireikað í 2003

Í 2003 er ætlanin eisini at gera nakað við hølistørvin á Læraraskúlanum og Fróðskaparsetrinum. Her er ikki talan um nýbygging, men umbygging, og kemur hetta at bøta munandi um hølisumstøðurnar hjá hesum skúlum.

Fyrireikingarnar av bygging av Miðnámsskúla í Suðuroy eru komnar so mikið áleiðis, at farið verður undir byggingina í

Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!